# Allan aftur á Argjum

**VODAFONEDEILDIN Allan Mørkøre og B36 stríðast fyri einum eyka heimadysti næsta ár, tá ið teir fara at vitja longu niðurflutta AB, sum B36 venjarin inntil fyri stuttum hevði ábyrgdina av**

Uni Holm Johannesen

Tað er longu fleiri vikur síðani, at tað var greitt, at AB næsta kappingarár skal spæla í næstbestu og ikki í bestu deildini. Áðrenn AB nakrantíð royndi seg í bestu deildini, plagdi tað at verða sagt, at argjamenn vóru B36 viðhaldsmenn. Næsta ár er møguleiki hjá teimum á Argjum aftur at taka á við B36, tí unga AB liðið, sum longu er farið at brynja seg til 2011, skal tá spæla fyri at flyta upp aftur í bestu deildina.

Í morgin verður tað Allan Mørkøre, sum inntil fyri fáum vikum síðani var AB venjari, ið kemur at vitja saman við B36. Hjá B36 snýr tað seg um at røkka fram á fimta plássið, sum ber við sær, at tað næsta ár verður ein heimadystur eyka sammett við tað liðið, ið endar á sætta plássi.

Sámal Erik Hentze, sum nú hevur ábyrgdina av AB liðnum, hevur fyri tað mesta blaðungar spælarar á liðnum. B36 hevur væl meiri royndar spælarar. Teir eru allir tøkir uttan málverjin Meinhardt Joensen, sum hevur brot í fótinum. Magnus Poulsen hevur seinastu ferðirnar vart málið, og tað fer hann eisini at gera í morgin.

Tá ið B36 í 4. umfari var á Argjum var úrslitið 2-2. Í 13. umfari vann B36 1-0 á AB í Gundadali.

*uni@sosialurin.fo*

# Tað stendur nógv upp á spæl

**VODAFONEDEILDIN B71 spælir fyri lívinum í bestu deildini, og ÍF spælir fyri einum eyka heimadysti næsta kappingarár**

Uni Holm Johannesen

Eitt skifti sá tað út til, at fuglfirðingar av álvara fóru at blanda seg upp í stríðið um FM, sum teir ikki hava vunnið síðani 1979. Soleiðis er tað ikki longur. Orsøkin er eitt nú tann, at ÍF í teimum fýra umførunum í september ikki hevur megnað at vinna fulla úrtøku.

Setningurin hjá ÍF er nú í hvussu so er at varðveita fjórða plássið og harvið at vinna rættin at spæla fjúrtan ferðir á heimavølli næsta kappingarár.

Tá ið ÍF sunnudagin legði rygg til 1-0 tap í Gundadali ímóti B36, vóru fuglfirðingar rættuliga skaðadarvaðir. Nenad Saric, Fritleif í Lambanum og Frank Poulsen, sum tó kom á vøllin í eina løtu, vóru skaddir. Teir eru allir tøkir aftur. Miðverjin Poul Ennigarð er burturstaddur, og ivaleyst fer liðformaðurin, Høgni Zachariasen, sum seinast sat á beinkinum, at spæla í miðverjuni.

Hóast teir vóru illa kroystir, og eydnaðist tað sandoyingum sunnudagin á heimavølli ímóti FC Suðuroy at koma aftur í aftur og harvið at varðveita fjarstøðuna aftur til niðurflytingarplássini. B71 spælir framvegis fyri lívinum í bestu deildini. Umframt ímóti ÍF skulu sandoyingar spæla ímóti EB/Streymi og NSÍ!

Síðsta sunnudag noyddist liðformaðurin, Símun Hansen, skjótt av vøllinum orsaka av skaða. Á Sandi vóna teir, at hann verður tøkur ímorgin.

Tá ið B71 í 4. umfari var í Fuglafirði endaði tað 1-1. Í 13. umfari vann ÍF 2-0 á Sandi.

*uni@sosialurin.fo*

# NSÍ fær ikki bilbukt



**Soleiðis siga tølini, men vit leggja ikki so nógv í tølini, at tað á nakran hátt ørkymlar okkum í fyrireikingunum til í morgin**

PAULI POULSEN, VENJARI HJÁ NSÍ

**VODAFONEDEILDIN Hóast NSÍ ikki hevur vunnið á HB í Gundadali í tíggju ár, so sigur Pauli Poulsen, venjari hjá NSÍ, einki benda á, at hansara spælarar stúra fyri oddabrakinum í morgin**

Uni Holm Johannesen

– Vit gleða okkum allir at fara í Gundadal í morgin. Tað sigur NSÍ venjarin, Pauli Poulsen, vegna seg sjálvan og sínar spælarar, nú tað av álvara stundar til toppbrakið í morgin millum HB og NSÍ.

Bæði NSÍ og HB hava 45 stig, og tað er einki at liggja omaná, at um annað liðið í morgin vinnur øll stigini í Gundadali, so fer tað liðið undan tveimum teimum síðstu umførunum at hava beina kós ímóti meistaraskapinum.

– Tað eru níggju stig eftir at spæla um, og vit eru trý og kanska fýra lið, sum hava møguleika at vinna FM, og ivaleyst eru øll, sum varða av hesum liðunum samd um, at tað bíða okkum tríggjar torførar avbjóðingar. Soleiðis kenna vit tað í hvussu so er, staðfestir Pauli Poulsen. Í næstsíðsta umfari skal NSÍ afturí Gundadal at spæla ímóti B36, og í síðsta umfari fara sandoyingar at vitja við Løkin í Runavík.

### Tølini ímóti sær

NSÍ og HB liggja lið um lið á støðutalvuni. HB plagar ofta at vera liðið, sum hevur betri málmun enn hini, men soleiðis er tað ikki hesa ferð. Málmunurin hjá NSÍ er +21, og hjá HB er hann +14.

Hagtølini siga, at HB er greiður favorittur í morgin. Níggju tey seinastu árini hevur tað ongantíð eydnast NSÍ at hava stig við sær til hús, eftir at teir í Runavík hava verið í Gundadali og spælt ímóti HB. Í 2001 var úrslitið málleysur javnleikur, og í 2000 vann NSÍ trivaligan 5-2 sigur á HB í Gundadali. Síðani hevur HB hvørja ferð vunnið fulla úrtøku.

– Soleiðis siga tølini, men vit leggja ikki so nógv í tølini, at tað á nakran hátt ørkymlar okkum í fyrireikingunum til í morgin. Síðani 2001 hava fleiri venjarar verið í NSÍ, og spælararnir eru eisini fleiri ferðir útskiftir. Eingin av teimum, sum verður við í morgin, var við,